Volvo Cars, Göteborg:

# Fleiri ófødd børn doyggja í ferðsluvanlukkum



*Linda er eitt teldumodell av eini testdukku, ið er við barn*

*Hjá Volvo Cars ivast tey onga løtu í, at tað altíð er rætt av barnakonum at brúka trygdarbeltið og at brúka tað rætt*



**Fleiri ófødd børn enn nýføðingar doyggja í ferðsluvanlukkum í USA, sigur Laura Thackray, granskari á Volvo Cars trygdarsentrinum í Göteborg Volvo Cars eru við í kanningum av bilvanlukkum, har kvinnur við barn eru uppi í**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Volvo í Göteborg hava í meira enn 30 ár havt eitt lið av serfrøðingum, sum kanna allar ferðsluvanlukkur, har ein Volvo er uppi í.

Nú hava Volvo Cars saman við deildini fyri burðarfrøði og gynækologi á Sahlgrenske Akademi á Göteborg Universitet eisini gjørt kanningar av títtleikanum og fylgjunum av bilvanlukkum í Svøríki, har kvinnur við barn hava verið uppi í.

Nógvar av trygdarskipanunum í dagsins bilum eru gjørdar við hjálp av testdukkum í ymiskum støddum, bæði sum vaksin og børn.

Fyri at læra meira um børn í móðurlívi og kvinnur sum eru við barn og koma út fyri ferðsluvanlukkum,

teldudukku, sum er við barn.

Nú dekka vit eisini eina aðra tilgongd í lívinum hjá okkara kundum, sigur Laura Thackray, verkfrøðingur við biomekanik og kollisiónsútrokning sum sergrein á trygdarsentrinum hjá Volvo Cars. Hon hevur sjálv gjørt eina dukku, sum skal eitast at vera við barn og givið henni navnið Linda. Linda er eitt teldumodell av eini testdukku.

Dr. Harold Weiss, ið er professari við universitetið í Pittsburgh og arbeiðir við skaðakanning, sigur, at fleiri børn í móðurlívi enn smábørn lata lív í ferðsluni í USA.

Royndir við testdukkuni Lindu hava víst, hvussu barnakonur skulu spenna trygdarbeltið rætt, so barnið fær minst møguligan skaða í einum ferðsluóhappi.

Simolator-royndir verða eisini gjørdar við bæði airbag og trygdarbeltunum.

Hjá Volvo Cars ivast tey onga løtu í, at tað altíð er rætt av barnakonum at brúka trygdarbeltið og at brúka tað rætt.



*Volvo Cars granska í hvussu teir best verja kvinnur við barn í ferðsluni*

## Bilasølan í Føroyum 2004

*Topp 10 listin*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Toyota | 240 | Peugeot | 78 |
| Mazda | 160 | Volkswagen | 73 |
| Citroën | 147 | Opel | 64 |
| Suzuki | 131 | Hyundai | 46 |
| Ford | 128 | Daewoo | 37 |

*Kelda: Bileftirlit Føroya*

## Samstarva um motorar



Tað er vorðið alt meira vanligt, at fleiri av stóru bilverksmiðjunum samstarva um menningina av motorum. BMW og PSA skulu samstarva um ein felags bensinmotor, sum skal nýtast til Citroën, Peugeot og BMW

*Kelda: Motor Magasinet*

## Sleppa ikki at sovna



Saab hava gjørt ein elektroniska trygdarskipan, sum heldur eyga við at bilførarin ikki sovnar undir koyring. Skipanin registrerar t.d. hvussu eyguni og høvdið hjá bilføraranum flyta seg, og ein alarmur sigur frá, um bilførarin er við at sovna

*Kelda: www.bilpriser.dk*

## Fiat og OL í Torino



Hóast ein løta er enn til teir 20. olympisku leikirnar í Torino í Italia byrja í 2006, bleiv rutan fyri olympiska eldin, sum byrjar 8. desember 2005, herfyri almannakunngjørd í Rom. Fiat eru sponsorar og skulu leiða fylgið við olympiska eldinum gjøgnum størstu býirnar í Italia

*Kelda: www.bilpriser.dk*